FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Leiðslufundur 12. apríl 2016

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru:<br><br>Frá kl. 10 | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Hans Pauli Joensen (HPS), Janus Jensen (JJ), Turið Sigurðardóttir (TS), Hans Andrias Sølvará (HAS) og Jørgen Meitilberg (JM)<br><br>Óli Simonsen (ÓS), Elin Brimheim Heinesen (EBH) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 12. apríl 2016 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til umrøðu:**

1. **Umboð fyri deildir at luttaka á verkstovuni fríggjadagin 15. apríl**
Í sambandi við arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum at fyrireika eina framtíðarætlan um hølisviðurskiftini á Fróðskaparsetri Føroya, verður skipað fyri verkstovum fríggjadagin 15. apríl. Ynskiligt er, at eitt umboð fyri hvørja deild luttekur á verkstovunum. Dekanarnir spyrja seg fyri á deildunum.

2. **Setursdagur 20. mai**
Tað er ov langt útligið til at skipa fyri setursdegi í ár. Ein nevnd skal setast í góðari tíð at skipa fyri degnum.

3. **Uppskot til avrikssáttmála**
Mentamálaráðið hevur sent Setrinum uppskot til avrikssáttmála fyri árið 2016. Sáttmálin fevnir ikki um allar rakstraruppgávur hjá Setrinum, men um tey fokusøki, sum Setrið savnar seg um at menna frameftir. Uppskotið er sent leiðsluni til hoyringar, síðani verður tað sent starvsfólkunum til hoyringar.
Miðað verður eftir at leggja uppskotið til avrikssáttmála fram á leiðslufundi tann 17. mai. 2016.

---

**Frá kl. 10**

**Kunningarmál:**

1. **Innleiðsludagur og innleiðslutúrar 2016**
LSS hevur gjørt eitt uppskot til skrá fyri felags innleiðsludag, sum eftir ætlan verður fríggjadagin 26. august. Skráin verður tikin upp á komandi samstarvsfundi við útbúgvingarleiðarnar.
LSS hevur somuleiðis gjørt eina skrá fyri innleiðslutúrar fyri 2016. Skráin verður tikin upp á komandi samstarvsfundi við útbúgvingarleiðarnar. Harumframt skal Ráð teirra lesandi hava skránna til ummælis.

/JM